FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
UNIVERSITY OF THE FAROE ISLANDS

# Leiðbeining til umsóknarblað til ph.d.–lestur á Fróðskaparsetri Føroya

Les leiðbeiningina væl, áðrenn tú fyllir umsóknarblaðið út. Skriva týðiliga, helst við spjaldrastavum

Fyri at verða tikin upp til ph.d.-nám á Fróðskaparsetri Føroya skalt tú hava lokið masternám (kandidatnám), sum er viðkomandi fyri ph.d.-námið, sum tú ætlar tær undir. Tú skalt skriva eina lýsing av ph.d.-verkætlanini og fáa fígging til hennara. Fíggingina kanst tú eitt nú søkja Granskingarráðið um at fáa, sí nærri á www.gransking.fo. Fíggjarætlanin í teirri umsóknini má vera góðkend á Fróðskaparsetrinum, áðrenn tú sendir umsóknina inn – serliga um talan er um, at Setrið skal vera við til at fíggja ph.d.-verkætlanina. Byrja tí í góðari tíð, at fyrireika umsóknina – eitt nú eitt hálv ár undan freistini, og set teg í samband við Fróðskaparsetrið fyri at fáa nærri vegleiðing til umsóknina.

Les kunngerðina um ph.d.-lestur á Setrinum væl og virðiliga.

Søkir tú um at Fróðskaparsetrið tekur ímóti og próvdømir eina ph.d.-rigerð, sum tú hevur skrivað, uttan at hava verið innskrivaður til ph.d.-nám, kanst tú gera tað eftir § 8 í kunngerðini. Tá skalt tú skriva eina frágreiðing um, hvussu tú hevur ognað tær tann kunnleika og teir førleikar, sum eru nevnd í ph.d.-kunngerðini § 6, stk. 1, nr. 1-5.

## 1. Persónsupplýsingar

*P-tal*: Um tú hevur føroyskt p-tal, verður tað skrivað her. Hevur tú ikki tað, skrivar tú føðingardag, mánað og ár í teir fyrstu 6 rútarnar til p-tal. Teir 3 síðstu rútarnir eftir strikuna skulu so standa tómir.

*Fornavn*: Her skrivar tú fornavn/nøvn og millumnavn.

*Eftirnavn*: Her skrivar tú eftirnavnið. Minst til, at øll hava bert eitt eftirnavn.

*Bústaðurin* er tað staðið, har ið tú nú býrt. Flytur tú, er tað av týdningi, at tú beinanvegin boðar Fróðskaparsetri Føroya frá nýggja bústaði tínum.

*Ríkisborgaraskapur*: Flestøll, sum búgva í Føroyum, eru danskir ríkisborgarar.

*Teldupostur*: SKAL fyllast út.

*Skerdur virkisførleiki*: Eru viðurskifti, ið tú heldur, at Setrið eigur at verða kunnað um, áðrenn tú byrjar lestur (t.d. at tú ert orðblind/ur, hevur niðursetta hoyrn ella hevur sálarligar avbjóðingar), skal hetta viðmerkjast.

## 2. Upptøkugrundarlag

Her skrivar tú árið, ið tú tókst masterprógv ella danskt kandidatprógv og heitið á útbúgvingini. Eisini skrivar tú nummar á fylgiskjalið, prógvið, sum skal sendast við.

Søkir tú eisini um upptøku á øðrum universitetið og hugsar um at fáa dupult ph.d.-prógv, skrivar tú hetta í teigin “Annað”.

## 3. Leiðbeining í samband við ph.d.-lestur:

Her skrivar tú, hvør hevur játtað at vera høvuðsleiðbeinari tín í ph.d.-náminum á Setrinum: navn, starvsheiti og starvsstaður. Um tú hevur funnið hjálparleiðbeinara, so skriva navni á henni/honum eisini.

## 4. Heiti á verkætlan:

Verður søkt um upptøku til vanligt ph.d.-nám (tað er eftir § 6 í kunngerðini) verður frá-greiðing um verkætlan (í mesta lagi 5 síður) løgd hjá umsóknini.

Um søkt verður sbrt. § 8, verður greitt frá ognaða kunnleikanum og avrit av ritgerðini verður sent við

## 5. Fígging

Her verður upplýst hvaðani fígging er fingin, hvussu nógv, og hvat tíðarskeið ætlanin er at brúka fíggingina.

**6. Undirskrift - MINST TIL HANA!**

Er ikki dagfesting og undirskrift á umsóknini,

verður umsóknin ikki viðgjørd.

Tú skalt sjálv/ur dagfesta og undirskriva umsóknina. Hevur tú ikki møguleika til tað, kanst tú geva eina fulltrú til ein annan persón, sum so hevur fulltrú til at søkja tína vegna.

Hendan fulltrú skal sendast saman við umsóknini. Oyðublað til fulltrú er síða 2 í umsóknarblaðnum.

Umsókn og skjøl kunnu sendast teldutøk til:

umsokn@setur.fo, cc. til reu@setur.fo

ella við Posta til:

Fróðskaparsetur Føroya
J.C.Svabos gøta 7,
Postsmoga 272,
FO-110 Tórshavn